## Virki skift eigara

Fiskavirkið Lido í Skálavík hevur fingið nýggjar eigarar. Tað er løgtingsmaðuirin Páll á Reynatúgvu á Sandi, sum hevur keypt virkið saman við øðrum. Tey hava keypt sjálvan virkisbygningin, men ikki maskinurnar. Virkið stendur á kommunalum øki, og sambært leigusáttmálanum skal tað brúkast til fiskaarbeiði. Tað ætla teir nýggju eigararnir ikki at brúka tað til, skrivar Dimmalætting, men tey vilja ikki siga enn, hvat tað skal brúkast til.

## Eftir telduspølum

Miðlaráðið, sum skal koma ístaðin fyri Filmseftirlitið, skal eisini kanna telduspøl, og longu nú er avgjørt, at ráðið skal fara í hernað ímóti teimum nógvu spølunum, sum nógv børn og ungfólk spæla við á teldunum. Sálarfrøðingurin Eyðun Joensen, sum er í nevndini, ið fyrireikar ráðið, sigur við Útvarpið, at í veruleikanum kunnu telduspøl vera meiri skaðilig fyri børn og ung enn filmar. Ráðið skal tí tryggja sær eftirlit við spølunum.

# Byggja sethús til barnagarð

**Tað fara at ganga nøkur ár enn, áðrenn børnini í Miðvági sleppa í ein nýggja barnagarð. Meðan bíðað verður, fer kommunan at byggja eini hús til barnaansingina. Hesi kunnu seinni seljast aftur sum sethús.**

BARNAANSING
*Snorri Brend*



*Stórar ætlanir liggja fyri framman í Miðvági, bæði tá talan er um útstykkingar og barnaansingina*

**Miðvágur:** Ein av føroysku bygdunum sum hevur megnað at nøkta tørvin á barnaansing er Miðvágs kommuna.

Hetta forðar tó ikki kommununi í at hyggja frameftir og seta ætlanir í verk á hesum øki.

- Helst skuldi ein nýggjur barnagarður staðið liðugur um hálvttriðja ár, fær Sosialurin upplýst úr Miðvágs kommunu.

Hesin nýggi barnagarðurin er prosjekteraður og lendið til hann er haraftrat keypt á Stórutrøð tey nevna, beint við Heilsumiðstøðina.

Sum skilst er ætlanin at byrja uppá arbeiðið í hesum árinum.

### Selja aftur

Skipanin við barnaansingini í bygdini er bítt upp í trý, - við dagrøkt, einum barnagarði í Miðvági og einum ansingartilboði á Vatnsoyrum.

Kommunan hevur samstundis staðfest at fólkatalið í kommununi hevur verið støðugt og vaksandi seinnu árini, og at tørvur tí hevur verið á fleiri grundøkjum.

Arbeitt hevur verið við eini útstykkingarætlan í Vatnsoyrum og einari í Miðvági, har kommunan arbeiðir við at ognartaka sær lendi til endamálið.

Fyri samstundis at kunna nøkta tørvin á ansingarplássum, samtykti bygdaráðið í farnu viku at byggja eini hús á einum av kommunalu grundøkjunum norðuri í Heiðum.

- Vit eru snøgt sagt noydd at finna eina haldgóða loysn, inntil nýggi barnagarðurin verður liðugur, verður sagt.

Ætlanin er, at tey elstu børnini í barnagarðsaldri skulu halda til í hesum húsunum, ið ætlanin seinni er at selja.

Bygdaráðið hevði frammanundan kannað fleiri møguleikar fyri eini loysn. Hetta varð kortini tann ætlanin sum varð vald.

- Her hevur kommunan møguleikan at selja húsið aftur, og sostatt fáa íløguna innaftur, verður sagt.

## Skulu kenna tryggleikan í trúnni

**Havn:** Í kvøld byrjar ein serstøk møtirøð í Ebenezer við Svenningi av Lofti og øðrum talarum.

Felagsheitið fyri øll tiltøkini er tað at liva í Kristusi, og verður hetta viðkomandi evnið lýst við talum, bíbliutímum og sangi.

Byrjað verður í kvøld kl. 20, tá Páll á Lakjuni og Svenning av Lofti tosa um evnið "Halgan og íðinskapur í Kristusi".

Leygardagurin verður allur sum hann er halgaður felags evninum fyri tiltakið. Seinnapartin verða nevniliga hildnir í alt fýra bíbliutímar um tryggleikan, lívið og tænastuverkið í Kristusi. Seinasti bíbliutímin er um tað at vera samverkamaður hansara.

Sunnumorgunin og sunnukvøldið verða eisini møtir við sama innihaldi.

Umframt Páll á Lakjuni og Svenning av Lofti fara Hjørleif Vang og Osmund Justinussen somuleiðis at tala.

Allir bíbliutímarnir eru almennir.

**sb.**



*Møtirøð í Ebenezer hesa vikuna*

# Ungdómslega umborð á Norrönu

**Síðani Norröna byrjaði at sigla millum Føroyar og útheimin hava mong ymisk tiltøk verið umborð á flaggskipi okkara. Fyrstu dagarnar í mars mánaði skipa tey ungu í Heimamissiónini fyri legu umborð**

UNGDÓMUR
*Snorri Brend*

**Norröna:** Tey hava fyrireika hesa forkunnugari og spennandi leguna í eina tíð. Og nú er skráin umsíðir liðug.

Legan byrjar hóskvøldið 1. mars kl 18, í somu løtu sum Norröna leggur frá landi í Havn. Endað verður, tá Norröna kemur aftur mánamorgunin 5. mars kl. 6.

Umborð á Norröna verða samansjóðandi tiltøk, møti og bíbliutímar fyri øll hesi ungu, sum skulu vera yvir 18 ár.

Fyrireikararnir vóna kortini, at tey eisini fara at síggja nógv eldri ung við á túrinum.

- Hetta er ein góður møguleiki hjá ungum hjúnum at koma á ungdómslegu aftur, sigur ein av stigtakarunum Reimund Langgaard.

Kostnaðurin fyri túrin er 800 kr fyri hvønn, tá er íroknað gisting og undirvísing, bæði umborð á Norrönu og í Bergen.

### Undirvísing og ungdómsmøti

Skráin fyri leguna umfatar ikki einans tiltøk umborð á Norrönu. Farið verður eisini í land.

Tá Norröna leggur at í Bergen, fara leguluttakarnir í land, og leggja leiðina á bíbliuskúlan í býnum Bildøy, har nógvir føroyingar hava verið.

Her skulu tey gista í tvær nætur, meðan Norröna siglir til Danmarkar og aftur til Bergen.

Á uppihaldinum í Bergen koma norskir bíbliuskúlalærarar at undirvísa teimum føroysku ungdómunum.

Høvi verður kortini til annað, tí seinnapartin leygardagin verður ein fríløta, har møguleiki verður at hyggja seg um og at shoppa.

Leygarkvøldið er ætlanin at luttaka á einum stórum norskum ungdómsmøti í Bergen.

Sunnumorgunin kemur Norrøna aftur eftir luttakarunum í Bergen, fyri síðan at føra tey heim aftur til Føroya. Her verður so aftur undirvísing, møtir og hugni umborð, til tey koma á Havnina mánamorgun kl 6.




*Norröna verður karmur um forkunnuga ungdómslegu fyrst í mars mánaði*